

## Rógvi og teir fingu av at vita

KR spældi í gjárkvøldið í íslendsku landskappingini í fótbólti, og tað endaði við einum eyðmýkjandi tapi til Rógva Jacobsen og liðfelagarnar. Grindavík vann heili 5-0 á KR, og tað er eitt tað største tapið í søguni hjá KR. Grindavík var á odda 2-0 í hálvleikinum, men innan eitt korter var farið av seinna hálvleiki, høvdu teir skorað trý mál afturat. Rógvi spældi allan dystin í álopinum hjá KR, sum hóast stórtapið framvegis liggur sum nummar 4 í íslendsku kappingini. KR liggur bert eitt stig aftanfyri nummar 2, sum nú er Grindavík.

## Lagnudystur í Vági

VB/Sumba og B68 spæla sunnudagin týðandi botndyst í Vági. Liðini bæði liggja lið um lið í botninum, og taparin av dystinum sunnudagin endar í eini keðiligari støðu. B68 hevur sama fólkið við hesaferð sum seinast. Arnbjørn Danielsen fór út við einum minni skaða seinast, og hann hevur vant lítið í vikuni, men hann spælir sunnudagin. Julian Johnsson spælir nú fulla tíð hvørjaferð, og hann er veruliga við at spæla seg heitan aftur. Hjá VB/Sumba er Hallur Dam Joensen tøkur aftur eftir leikbann seinast.

# Troytt HB-lið skal spæla klókt

**– Vit trúgva upp á møguleikan at vinna dystin, men vit skulu spæla klókt, um vit skulu vinna, sigur HB-venjarin Krzysztof Popczynski undan Intertoto-dystinum ímóti FC Dinaburg. Dysturin leygardagin er tann fimti hjá HB í 13 dagar**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygardagin spælir HB seinna dystin í Intertoto Cup ímóti FC Dinaburg. HB fekk frálíkt úrslit í fyrra dystinum, tí tað eydnaðist at koma heimaftur við einum1-1 javnleiki í viðførinum. Nú kann HB seta prikkin yvir i'ið við einum góðum úrsliti á heimavølli, og harvið koma víðari í kappingini.

– Tað er eingin løtt uppgáva, sum vit hava. FC Dinaburg er eitt gott lið. Teir eru kropsliga betur fyri enn vit, tekniskt eru teir allir góðir, og so hava teir nakrar sera skjótar spælarar. Harafturat hava teir eisini kunna fyrireika seg betur, tí teir hava fingið hvíld síðani seinasta dystin, sigur Krzysztof Popczynski, venjari hjá HB.

HB hevur rættiliga verið í eldinum við nógvum dystum seinastu vikurnar. Dysturin leygardagin er fimti dysturin í 13 dagar, og tað er sera krevjandi fyri føroyskar spælarar.

– Hetta krevur sera nógv av spælarunum, og vit eru komnir hartil, at møðin má fara at vísa seg. Tí skulu vit spæla sera klókt ímóti Dinaburg, um vit skulu koma víðari, sigur Krzysztof Popczynski.

### Bjóða av frameftir

HB ætlar sær ikki bara at leggja seg aftur á vøllin at verja við 11 monnum, hóast liðið kann klára seg við 0-0 javnleiki.

– Føroysk feløg gera ofta tað mistakið, at tey leggja seg heilt aftur á vøllin og bara hugsa um at verja. Tað fara vit ikki at gera. Sjálvsagt fara vit ikki heilt fram á vøllin at trýsta teir, men vit ætla eisini at spæla álopsfótbólt, sigur HB-venjarin.

– Teir hava eina stóra og sterka verju, men teir eru ikki so skjótir í verjupartinum, og tí kunnu vit hava ein møguleika við okkara skjótu spælarum. Vit skulu tora at leypa á, og spælararnir skulu tora at bjóða av í ein-móti-ein støðum, sigur Krzysztof Popczynski.

Dysturin millum HB og FC Dinaburg verður spældur á Tórsvølli leygardagin kl. 18.00.



*– Føroysk feløg gera ofta tað mistakið, at tey leggja seg heilt aftur á vøllin og bara hugsa um at verja. Tað fara vit ikki at gera, sigur HB-venjarin Krzysztof Popczynski undan Intertoto-dystinum leygardagin*

# Havnarmenninir venja ikki

**Bæði á Skála og í EB/Streymi skulu teir hesa ferð klára seg uttan lyklaspælarar, ið ikki eru tøkir**

SKÁLA-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Tað plagar at vera tætt, tá ið nýggjastu feløgini í Eysturoy í fremstu deildini telvast, og soleiðis tykist tað eisini fara at vera hesa ferð, hóast fjarstøðan á støðutavluni er stór. Skála hevur givið øllum oddaliðunum skarpan gang, men úrtøkan hevur verið lítil. Hjá EB/Streymi hava avrikini og úrtøkan samsvara, og tí er felagsliðið ovast.

Í fleiri ár hava Bjarni Jørgensen og Pætur Dam Jacobsen ferðast úr Havnini og inn á Skála at venja og spæla. Í ár hava teir havt Levi Hanssen í ferðalagnum. Hesar seinastu vikurnar hevur Levi verið einsamallur. Bjarni er vøddaskaddur, og Pætur er knæskaddur. Hvørgin teirra verður við sunnudagin. Eftir at hann leingi treiskaðist skal Bjarni nú binda frið, inntil skaðin er burtur. Hvussu tað verður hjá Pæturi fæst at vita mikudagin, tá ið teir fara at kanna knæið.

### Sorin ivamsamur

Hjá EB/Streymi er tað ivasamt, um Sorin Anghel verður við. Hann hevur ikki vant í vikuni orsaka av skaða. Ronnie Samuelsen verður ikki við, tí hann skal giftast í morgin. Arnbjørn Hansen er langtíðarskaddur.

Móti VB/Sumba var Knút Vesturtún miðvallari, og Sorin Anghel var einsamallur á toppinum. Hvussu kabalin skal leggjast hesa ferð valdast ikki minst um støðuna hjá Sorin Anghel. Ein møguleiki er, at Fróði Clementsen verður settur í miðverjuna og Marni Djurhuus á miðvøllin, og ein annar er, at liðformaðurin og gamli málrevurin Egil á Bø verður fluttur úr miðverjuni og fram í álopið.

**formuladeildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 13 | 8 | - | 3 | - | 2 | 29 | 15 | 14 | 27 |
| 2 GÍ | 13 | 7 | - | 5 | - | 1 | 21 | 11 | 10 | 26 |
| 3 HB | 14 | 7 | - | 4 | - | 3 | 33 | 20 | 13 | 25 |
| 4 NSÍ | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 27 | 16 | 11 | 24 |
| 5 B36 | 13 | 6 | - | 5 | - | 2 | 17 | 13 | 4 | 23 |
| 6 KÍ | 14 | 5 | - | 7 | - | 2 | 29 | 17 | 12 | 22 |
| 7 Skála | 13 | 3 | - | 2 | - | 8 | 14 | 16 | -2 | 11 |
| 8 B68 | 13 | 2 | - | 2 | - | 9 | 11 | 22 | -11 | 8 |
| 9 ÍF | 13 | 2 | - | 2 | - | 9 | 13 | 31 | -18 | 8 |
| 10 VB/S | 13 | 2 | - | 1 | - | 10 | 12 | 45 | -33 | 7 |

**1. deild menn**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 13 | 10 | - | 1 | - | 2 | 30 | 13 | 17 | 31 |
| 2 B71 | 13 | 9 | - | 2 | - | 2 | 61 | 14 | 47 | 29 |
| 3 LÍF | 13 | 8 | - | 3 | - | 2 | 30 | 12 | 18 | 27 |
| 4 FSV04 | 13 | 7 | - | 1 | - | 5 | 29 | 15 | 14 | 22 |
| 5 TB | 13 | 6 | - | 3 | - | 4 | 21 | 21 | 0 | 21 |
| 6 SÍ | 13 | 6 | - | 1 | - | 6 | 39 | 33 | 6 | 19 |
| 7 HB | 13 | 5 | - | 2 | - | 6 | 35 | 30 | 5 | 17 |
| 8 KÍ | 13 | 4 | - | 2 | - | 7 | 27 | 44 | -17 | 14 |
| 9 VB/S | 13 | 2 | - | 0 | - | 11 | 10 | 55 | -45 | 6 |
| 10 Royn | 13 | 0 | - | 1 | - | 12 | 8 | 53 | -45 | 1 |

# Fenerbahce bíðar eftir B36

Lutakast til innleiðandi umførini í Champions League var fyrr í dag, og føroyska umboðið í kappingini, B36, dró í fyrsta umfarinum lið av Malta.

22 lið eru við í fyrsta innleiðandi umfari av Champions League, og lutakast fall soleiðis út fyri B36, at teir skulu spæla ímóti Birkirkara av Malta.

Fyrri dysturin hjá B36 verður á útivølli 11. juli, og seinni dysturin á heimavølli 19. juli.

Kemur B36 víðari frá fyrsta umfarinum, bíðar turkiska stórliðið Fenerbahce í næsta umfari. Dystirnir á vølli í Turkalandi eru tiltiknir, og tað verður nakað av einum avbjóðing fyri B36, um havnaliðið kemur so langt.

Lutakast var eisini í dag til UEFA Cup kappingina, har Skála og GÍ eru við, men tað var eftir evstamark her á blaðnum. Les meira um hetta á olivant.fo